# ELEKTRIKKARI

***Vit vænta at tú:***
- ert arbeiðssamur
- hevur royndir innan økið (tó eingin treyt)
- ert álítandi
- ert fyrikomandi
- ert samarbeiðsvilligur
- ert førur fyri at taka avgerðir

***Vit kunnu bjóða tær:***
- eitt spennandi og avbjóðandi starv
- eitt gott arbeiðsumhvørvið í eini fyritøku í menning

Hevur hetta tín áhuga, kanst tú ringja til Oddur á telefon 505886

KEV

KONGSHAVNAR EL-VIRKIÐ
Bakkavegur 6
FO-625 Glyvrar
Tel. 448886
kev@kev.fo


ENDURLÝSING

Mentamálaráðið
FÓLKASKÚLADEILDIN

## ÚTOYGGJALÆRARASTARV Í MYKINES SKÚLA

Starvið sum útoyggjalærari í Mykines skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2006.

**Um starvið**
Útoyggjalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur alla undirvísingina í skúlanum. Starvið er fulltíðarstarv, og næsta skúlaár verður ein næmingur í Mykines skúla

**Søkt verður eftir útoyggjalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av dagligu undirvísingini.
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim.
- dugir at samstarva og er fyrikomandi.
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar.
- skal skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd.
- skal eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.
- hevur hugsjónir um skúlamenning, og hvussu menningarætlanin verður sett í verk.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við tænastu í Mykines skúla.

Starvið verður lønt í lønarflokkunum 21.2, 23.2, 23.3, 23.4, 25.4, 27.4, og 30.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsókn saman við prógvi, C.V. o.ø. skal verða Mentamálaráðnum í hendi **í seinasta lagi týsdag 16. mai 2006.**

Umsóknin verður stílað til:
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra, tlf. 355050.

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

sansir.fo

# Altjóða Dagur Sjúkrarøktarfrøðinga

Í sambandi við Altjóða Dag Sjúkrarøktarfrøðinga, verður skipað fyri almennum tiltaki í Norðurlanda-húsinum mikudagin 10. mai 2006 kl. 14.00.

Evnið er **Sjúklingatrygd.**

**Millum fyrilestrarhaldararnar verða:**
Pernille Schlebsager úr Danmark
Hans Trygvi Teirin, advokatur
og Marin Vang, sjúkrarøktarstjóri.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, setir dagin.

Eisini er sangur á skránni.

Víst verður til heimasíðu felagsins: www.sff.fo

**Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**


OPTIKBÚÐIN

Bøgøta 5 - Boks 3092 - FO-110 Tórshavn
Tlf. 310088 - Fax 310058

Søkt verður eftir fólki, ið kann byrja skjótast gjørligt.

Viðkomandi skal kunna arbeiða sjálvstøðugt, verða ágrýtin og kundavinarligur.
Eisini er neyðugt, at viðkomandi hevur eitt sindur av teldukunnleika og handilsroyndum.

Áhugaði kunnu senda okkum eina umsókn


**Um hóskandi boð fæst, verður ognin við Ánna 40 í Norðargøtu seld.**

Húsini liggja væl fyri í bygdini, við sera góðum útsýni í allar ættir. Húsini eru í trimum hæddum á 92 m².
Tilhoyrandi seyðarhús við hjalli og hoyggjhúsi.

| | |
|---|---|
| Byggiár: | 1953, 1971. |
| Grundøkið: | 1014 m². |
| Kjallari: | Stórt bryggers/vaskirúm, eitt stórt kjallararúm og eitt minni rúm, har inngongin er í kjallaranum. Trappur eru úr bryggers upp á stovuhædd. |
| Stovuhædd: | Durur, gongd, køkur, stór stova, sjónvarpsstova, lítið kamar og toilet. |
| 1. hædd: | 4 stór kømur og baðiverilsi. |

10 áseyðir við innagarðsjørð kunnu eisini seljast saman við ognini.



Magnus Gregersen
Fartelefon 222206
Heima 442040

# Kunngerð
## frá útskiftingarnevndini fyri Hests bygd

Á útskiftingarfundi hósdagin 4. mai 2006 í bygdarstovuni í Hesti varð lagt fram fyribilsplanur og ætlaða komunala ognartøkan.

Skjølini liggja frammi á Matrikulstovuni og í skúlanum í Hesti.

Viðmerkingar til framløgdu skjøl skulu vera skrivligar og stílast til útskiftingina, Matrikulstovan, boks 327, 110 Tórshavn, innan 20. mai.

Tórshavn, tann 8. mai 2006

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útskiftingarformaður


# SALONGIN

ER STONGD FRÁ HÓSDEGNUM 11. MAI, KL. 15 TIL TÝSDAGIN 16. MAI

TLF. 315211

FRISÖR Fyngsø


# Fimleikafelagið Ljósið

Árligi aðalfundurin verður 23. mai 2006 kl. 19.00 í ÍSF-húsinum.